# Evropeiski dreymurin livur

**B36 hevur ein góðan møguleika at spæla seg víðari í UEFA-Cup kappingini, eftir at teir hóskvøldið megnaðu ein 1-1 javnleik móti íslendska ÍBV í Vestmannaoyggjunum**

UEFA-CUP
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Beinanvegin sum lutakastið til ársins UEFA-Cup kapping hevði verið, og tað var greitt, at B36 skuldi dystast við íslendska ÍBV, vóru tað fleiri fótbóltskønir føroyingar, ið søgdu, at hetta var ivaleyst besti møguleikin nakrantíð hjá einum føroyskum liði at spæla seg víðari í evropeiskari kapping. At nakað var um prátið, prógvaði B36 í Vestmannaoyggjunum hóskvøldið.

### Innlegg endaði í netinum

B36 fekk eina dreymabyrjan upp á dystin, tá ið teir longu í 6. minutti løgdu seg á odda. Ungi framherjin Bergur Midjord var upp á spæl úti í aðrari síðuni, og hann sendi eitt væla innlegg móti ÍBV-málinum. Allan Mørkøre kom tuskandi móti bóltinum, og veteranurin, Birkir Kristinson, í málinum hjá ÍBV væntaði ivaleyst, at gamli liðfelagin hjá honum fór at snitta bóltin, men tað gjørdi Allan ikki, og so var málverjin fullkomiliga snýttur, og innleggið hjá Bergi endaði í netinum.

Hetta var vorðið sum byrjan hjá B36, og havnarliðið stóð einki aftan fyri íslendska liðið, sum royndi at trýsta fyri at koma upp á javnt.

Tað eydnaðist eisini íslendingunum at javna, tá ið fyrri hálvleikur var gott og væl hálvrunnin. Eitt ÍBV-álop tykist rættuliga vandaleyst, tá ið B36'arnir eru rættuliga óhepnir, tí bólturin rakar ein av teirra verjuleikarum og dettur fyri føturnar á ÍBV-framherjanum, Petur Oskar Sigurdsson, ið staddur áraka brotsteigarmarkið er knappur og sendir bóltin framvið Jákupi Mikkelsen og í netið til 1-1.

### Høvdu risamøguleika at taka leiðsluna aftur

Dysturin í Íslandi var rættuliga javnur, og málmøguleikarnir vóru javnt býttir millum liðini bæði. Størsta møguleikan í seinna hálvleiki átti B36 tó, tá ið Allan Mørkøre á gamla heimavøllinum hjá sær gjørdist púra leysur við Birkir Kristinsson, men skotroyndin hjá klaksvíkinginum var ikki nóg neyv og rakti beint á málverjan hjá ÍBV.

Sum skilst var javnleikur eitt rættvíst úrslit av undirhaldandi dystinum, og tað er einki at siga til, at hýrurin var góður á B36-hópinum, tá ið vit fingu fatur á teimum umvegis fartelefonina seint hóskvøldið.

Nú hevur B36 eitt framúr gott útgangsstøði til returdystin, sum verður á Tórsvølli ólavsøkuaftan, og havnarliðið kann til dømis taka til takkar við einum málleysum javnleiki fyri at tryggja sær víðari luttøku. Karmarnir til tann dystin verða ivaleyst góðir, og tað er einki at ivast í, at nú B36 hevur ein so góðan møguleika at skriva søgu, fara nógv fólk at leita sær niðan í Gundadal á tjóðarhátíð okkara at geva teimum dyggan stuðul.

### FAKTA

**ÍBV Vestmannaeyjar - B36 Tórshavn 1-1(1-1)**
0-1 Bergur Midjord 6.
1-1 Petur Oskar Sigurdsson 25.
**ÍBV:** Birkir Kristinsson - Páll Almarsson, Bjarni Geir Vidarson, Matthew Platt(Andrew Sam 74.), Bjarni Holm Aðalsteinsson - Heimur Smári Gudmundsson, Atli Johannson, Ian Jeffs, Petur Rúnolfsson - Petur Oskar Sigurdsson(Egil Jóhannsson 89.), Steingrímur Jóhannesson(Bjarni Rúnar Einarson 60.)
**B36:** Jákup Mikkelsen - Kenneth Jacobsen, Pól Thorsteinsson, Fróði Benjaminsen, Alex Jose dos Santos - Ingi Højsted(Bárður H. Joensen 90.), Mikkjal Thomassen, Niels Joensen(Levi Hanssen 87.), Klæmint Matras - Allan Mørkøre, Bergur Midjord
**Gult kort:** Fróði Benjaminsen, Allan Mørkøre, Mikkjal Thomassen, Bergur Midjord
**Dómari:** Adrian McCourt (N-Írl.)
Linjuverjar: John McDowell og Paul Munn
**4. dómari:** Adrian Ball

# Rokaligt í Gøtu

**Úsetti dysturin í Gøtu millum GÍ og TB, sum var leiktur hóskvøldið, gjørdist rættuliga rokmikil, og nógv rok var í sambandi við øll trý málini í dystinum, sum GÍ vann 2-1**

FORMULADEILDIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Talan var annars um ein rættuliga javnan dyst við fáum málmøguleikum. GÍ hevði bóltin mest, men tværamenn stóðu rættuliga væl á vøllinum, og tað gekk striltið hjá heimaliðnum at opna tøttu verjuna hjá TB.

### Ivi um øll málini

GÍ legði seg á odda, tá ið eitt korter var farið av seinna hálvleiki. Ein bóltur var sendur inn í brotsteigin hjá TB, har Óli Johannesen og ein GÍ-leikari fara eftir honum, og teir bresta saman. Dómarin, Petur Reinert, er ikki í iva og dømir brotsspark til GÍ, sum Sámal Joensen setir í netið. Tværamenn vóru ógvuliga ónøgdir við hesa avgerð.

Men eitt korter fyri tíð fær TB javnað. Eitt hornaspark endar inni í málteiginum hjá GÍ, har Emanuel Larby og GÍ-málverjin, Marcin Dawid, fara upp eftir bóltinum. Málverjin fer um koll, og Larby skallar bóltin í málið til 1-1. Nú vóru tað gøtumenn, ið áttu tørn at verða ónøgdir við dømingina, og tað gjørdi ikki støðuna betur, at Marcin Dawid noyddist av vøllinum við skaða í sambandi við hendingina. Fríggjadagin skuldi Marcin Dawid til Havnar, har røntgenmynd skuldi takast av arminum, tí ótti var fyri, at hann var brotin.

Sigursmálið hjá GÍ kom, tá ið vanliga leiktíðin var farin. Ein langur bóltur var sendur niðan móti GÍ-álopinum. Óli Johannesen og ein GÍ-framherji fara eftir bóltinum, og báðir fara um koll. Bólturin fer longur fram eftir vøllinum, har Áslakkur Petersen gerst leysur við Predrag Markovic í TB-málinum, men dómarin bríkslar bráddliga. Tey flestu ivaðust ikki í, at fríspark var dømt til TB, men dómarin dømdi fríspark til GÍ. Tværamenn vóru ónøgdir, og tað vóru gøtumenn eisini, tí Áslakkur var púra leysur við málverjanum. Men fríspark var dømt, og tað sendi Sámal Joensen í verjumúrin hjá TB, so bólturin broytti kós og snýtti Predrag í TB-málinum.

### Óli kennir seg snýttan

Tá ið vit eftir dystin tosaðu við verjuálitið hjá TB, Óla Johannesen, var hann ógvuliga ónøgdur við leiklut dómarans í sambandi við bæði málini hjá GÍ.

- Í sambandi við brotssparkið skal eg sparka bóltin burtur, tá ið ein GÍ'ari stemplar meg á skinnabeinið. Tá var eg glaður fyri skinnaran, tí annars eri eg bangin fyri, at eg hevði brotið beinið, sigur Óli Johannesen, sum ikki dugir at skilja, at dómarin kundi døma brotsspark í tí førinum.

Landsliðsskiparin setur eisini spurnartekin við málið hjá TB, ið hann helt verða eitt slag av eini kompensatión fyri brotssparksavgerðina.

- Tá ið teir fáa sigursmálið, er tað upp á eitt fríspark, sum verður dømt móti mær. Eg fari eftir einum langum bólti og eri framman fyri ein GÍ-leikara, sum kemur í ryggin á mær, so vit báðir fara um koll. Bólturin stakk til ein púra leysan gøtumann, men dómarin bríkslaði, og eg ivaðist ikki í, at nú fekk eg frísparkið, sum eg átti. Men hann dømdi til GÍ, og eg stóð sum kánus. Eg haldi, at tað er ótrúliga bitturt, at vit tapa handan dystin, tí bæði málini hjá teimum koma eftir skeivar dómaraavgerðir eftir mínum tykki, sigur Óli Johannesen, sum heldur, at burtursæð frá áðurnevndu hendingum dømdi Petur Reinert væl.

Leikandi venjarin hjá GÍ, Krzystof Popczynski, segði eftir dystin, at hann eisini helt iva verða um okkurt av málunum, men hann vildi tó ikki gera stórvegis viðmerkingar til avgerðirnar, fyrr enn hann hevði sæð sjónbandaupptøkurnar av dystinum.

### FAKTA

**GÍ-TB 2-1(0-0)**
1-0 Sámal Joensen brtsp. 60.
1-1 Emanuel Larby 79.
2-1 Sámal Joensen 90.
**GÍ:** Marcin Dawid(Mortan Joensen 79.) - Jónreid Dalheim, Robert Rzeczycki, Atli Gregersen, Bjarni Justinussen(Leivur Hansen 72.) - Símun Louis Jacobsen(Áslakkur Petersen 65.), Sámal Joensen, Hanus Jacobsen, Sam Jacobsen - Krzystof Popczynski, Poul Arni Jacobsen
**TB:** Predrag Markovic - Predrag Zivkovic, Ace Petrovic, Óli Johannesen, Jón Johannesen - Dan Mortensen(Búi Mortensen 73.), Alexander Jovevic, Bárður Dimon, Einar Petersen - Olivur Abrahamsen(Hallur Christansen 73.), Emanuel Larby
**Gult kort:** Robert Rzecycki
**Reytt kort:** Poul Arni Jacobsen
**Dómari:** Petur Reinert